Desember



*Føroyar standa seg so illa í PISA-kanningum, at breið semja er um, at fólkaskúlin má betrast*

# Dumpaðu aftur í PISA

**Endaliga úrslitið av PISA-kanningini varð kunngjørt í morgun, og enn einaferð mugu vit ásanna, at fakliga støðið hjá føroyskum skúlanæmingum er alt ov lágt í PISA-samanhangi**

Hýrurin var onki serligur í Mentamálaráðnum, tá tíðindafundur var um úrslitið av veruligu PISA-kanningini.

Tá úrslitið av undankanningini varð kunngjørt í mai 2006, vóru føroyingar fullkomiliga tiknir á bóli, tá tað vísti seg, at vit lógu á botninum, samanborið við onnur lond í OECD.

30. mars í 2006 varð so tann veruliga PISA-kanningin gjørd, og var tað úrslitið av hesari kanning, sum var kunngjørt í dag. Tey ungu, sum eru við í altjóðakanningini, eru 15-16 ára gomul, og eru sostatt úr ymiskum skúlaformum, í høvuðsheitum úr 9. flokki í fólkaskúlanum. Í PISA-Føroyum 2006 luttóku 764 næmingar á 9. floksstigi í 23 skúlum.

Í niðurstøðuni av kanningini verður sagt, at undankanningin fyri PISA-Føroyar 2005 var orsøk til vónbrot vegna tey vánaligu úrslitini. PISA-Føroyar 2006 vísir, at ávísar broytingar eru í sambandi við støddfrøði og náttúrufak, men at talan framvegis í einari altjóða samanbering er um vánalig úrslit, ið geva orsøk til stúran.

## Náttúrufakini

Í niðurstøðuni frá Pisa-kanningini 2006 sæst, at næmingarnir liggja á einum lágum støði, tá ið umrøður náttúrufak, harav liggja teir munandi lægri enn hini Norðurlondini. Samanborið við øll londini í kanningini enda Føroyar á á einum 47. plássi, millum Tailand og Rumenia. Sermerkt er harumframt, at føroysku genturnar duga lutfalsliga betur enn dreingirnir at kenna aftur náttúrufakligar spurningar. Í flestu londum eru dreingirnir annars betri enn genturnar á hesum øki.

## Lesing og støddfrøði

Eisini í sambandi við lesing liggja føroysku næmingarnir lágt, á einum 45. plássi millum Meksiko og Bulgaria. Í støddfrøði er støðið heldur frægari, á einum 41. plássi millum Grikkaland og Ísrael - men framvegis munandi lægri enn norðurlendska miðalstigið. Í mun til PISA-Føroyar 2005 eru broytingar at síggja í náttúrufakum eins væl og í støddfrøði.

## Útbúgvingarstøðið heima

Í Føroyum eins og í øðrum londum er samband millum testúrslitini hjá næmingunum og útbúgvingarliga bakstøðið hjá foreldrum teirra. Snýr tað seg um vinnuligan status, er aftur beinleiðis samband. Somuleiðis er samband millum testúrslitini og útbúgvingarligt tilfeingi í heiminum, eins og samband er, tá ið tað snýr seg um materiellar ognir í familjuni.

Viðvíkjandi uppmerksemi í umhvørvisspurningum liggja føroysku næmingarnir munandi lægri enn støðið hjá OECD. Men teir eru meira bjartskygnir viðvíkjandi útlitunum fyri umhvørvinum, enn miðal-støðið hjá OECD.

## Átøk síðstu tíðina

Sambært Mentamálaráðnum eru ávís tiltøk framd síðani undankanningina sept. 2005. Fleiri tímar í 1., 2. og 3. flokki, økt játtan til undirvísingarmiðlar, setan av lesiráðgeva, fleiri skúlar hava framt lesiátøk, støðuroyndir verða settar í verk, landsroyndir verða settar í verk, kravt at fara til fráfaringarprøvtøku fólkaskúlans í øllum lærugreinum, ásetan av innihaldi í forskúlaflokki og greið mál í lesiætlanunum.

*- Eg taki mær ikki av tí, tá ið kritikarar finnast at mínum tónleiki. Fólkini, sum keypa og lurta eftir mínum tónleiki, eru røttu dómararnir. Tey kunnu veruliga meta um tónleikin og ikki tey, sum fáa pengar fyri at finnast at.*

*Johnny Logan, írskur sangari á vitjan*

*- Skotar draga túsundtals turistar til landið við einum Lock Ness ódjórið, sum ikki er til, og tá áhugin hjá japanum dalar, verða nýggjar myndir av dýrinum gjørdar, og so er aftur nýggjur áhugi. Teir duga at selja seg. Meðan vit hava eitt ótal av søgum, men gera einki fyri at marknaðarføra tær.*

*Niklas Heri Jákupsson*

## Best í verðini

Eysturoyarbólkurin Boys In A Band gera bart, tá ið teir eru við til finaluna í heimsumfatandi tónleikakappingini Global Battle of the Bands. Boys In A Band gera ikki mætari enn at vinna kappingina.

- Tað gekk faktiskt rættiliga long tíð – næstan ein tími! áðrenn vit fangaðu tað, at tað vóru vit, sum høvdu vunnið. Tá tað so gekk upp fyri okkum, var tað ein ótrúliga góð kensla, sigur Símun Skorastein, ein av tónleikarunum í bólkinum.

## Børnini fram um skrubbuna

Tað er vorðið meira vanligt, at fólk fáa sær vaskihjálp frá útlendskum kvinnum í Føroyum. Ein kvinna, sum Sosialurin hevur tosað við, sigur, at hon brúkar vaskihjálp fyri at fáa meira tíð til familjuna.

- Nú kann eg til dømis baka pannukøkur við børnunum um kvøldi, eftir at skúlatingini eru gjørd, ístaðin fyri at standa við høvdinum í wc-kummuni og skrubba ella renna runt við eini tvøgu, sigur kvinnan.

## Brandur til tops

Brandur Enni er rættiliga komin við í fína selskapið í Svøríki, eftir at hann varð valdur út til at taka lut í svenska Tónleika Grand Prixnum. Christer Bjørkman, ið er fyriskipari av allari kappingini sigur, at Brandur hevur stórar møguleikar at vinna.

- Hann hevur ein avberagóðan sang og er sera dugnaligur hóast sín unga aldur. Eg havi hoyrt sera nógv positivt um Brand, og nógv fløgufeløg her í Svøríki hava leingi verið áhugað í honum, sigur Bjørkman.